Barnagarðurin í Gøtu stongdur

Verkfallið hevur nú havt avleiðingar fyri fyrstu dagstovnarnar. Í Gøtu mugu 90 børn verða heima, tí dagstovnurin er stongdur

DAGSTOVNUR
Eyðun Klakstein

Dagstovnurin í Gøtu hevur nú latið aftur, og 90 børn sleppa ikki í barnagarð ella í vøggustovu.

– Eingin hevur vaskað síðani týsdagin, og tað er nú so skitið, at tað ber ikki til at hava børn her, sigur Torgerð Hansen, sum er leiðari fyri dagstovnin við Gøtugjógv.

Tí avgjørdi leiðarin, at dagstovnurin skuldi latast aftur, og komandi dagarnar skulu familjurnar finna onnur ansingarpláss til børnini.

– Hetta er ein sera óheppin støða, men vit vóna, at verkfallið verður skjótt av, sigur Torgerð Hansen.

– Tað er tó greitt, at vit kunnu ikki lata uppaftur, fyrr enn dagstovnurin er vaskaður, sigur hon.

Skúlar og dagstovnar í høvuðsstaðnum verða vaskaðir, hóast Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag eru í verkfalli. Skúlar og dagstovnar, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at hjá teimum verður vaskað sum vanligt.

Hetta ger samstundis, at dagstovnar og skúlar kunnu hava opið.

Barok hevur kvøld fyri tilkomin

Klaksvík: Leygarkvøldið fer Barok at skipa fyri einum tiltaki, sum serliga er ætlað teimum tilkomnu.

Síðani Barok lat upp hava ungfólk brúkt staðið nógv – bæði gjøgnum vikuna og um vikuskiftið. Tey meiri tilkomnu hava ikki verið nógv at sæð, og tí heldur Barok, at tað er upplagt við einum tiltaki til tey.

Bólkurin Hjún fer at spæla til dans leygarkvøldið, og aldursmarkið verður 25 ár.

Við hesum tiltaki vónar Barok, at tey tilkomnu eisini hava hug at brúka staðið av og á.

ek

Rás 2 betrar sendinetið

Nýggir sendarar og størri sendistyrki skulu tryggja betri góðsku og meiri umfatandi sendinet hjá Rás 2

RÁS 2
Eyðun Klakstein

Rás 2 fer komandi tíðina at betra um sendinetið hjá sær. Útvarpsrásin hevur søkt um loyvi at senda við størri styrki, og eisini skulu nýggir sendarar setast upp.

Antennan í Havn skal flytast á Húsareyn, so høvuðsstaðarøkið fær betri signal. Harvið verður signalið til restina av Føroyum eisini betri.

Nýggjur sendari skal setast upp á Hestinum, so Suðuroyggin fer at hoyra Rás 2 betri. Í løtuni hoyrir partur av Suðuroy rásina.

Vestmenningar keypt repeatara

Í Vestmanna hava nøkur virki tikið seg saman um at keypa ein repeatara, so allur býurin fer at hoyra Rás 2 betri.

– Tað er ikki trupult at syrgja fyri sendineti til 80% av fólkinum, men tað er sera kostnaðarmikið at fáa sendingarnar út til seinastu 20 prosentini, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

Tí kemur tað væl við hjá rásini, at fólk og virki eru við til at útbyggja netið, soleiðis sum vestmenningar hava gjørt. Rás 2 sigur seg verða sinnað at hjálpa øðrum, um tey hava líknandi ætlanir.

Rás 2 hevur søkt um loyvi at sleppa at senda við 1 kilowatti, og um hetta loyvi fæst til vega, fer tað at bøta munandi um góðskuna á sendingunum hjá rásini.

Politikarar geva verkfallinum frið

Politisku myndugleikarnir ætla sær ikki at leggja seg út í verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag. Slaturin hevur annars gingið um, at løgmaður í dag fór at leggja seg út í trætuna

VERKFALL
John Johannessen

Verkfallið er skaðiligt fyri samfelagið, men vit hava ongar ætlanir um at leggja okkum út í tað.

Hetta vóru greiðu boðini frá løgmanni, tá Sosialurin vildi hava hann at vátta ella avsanna lívligu leysatíðindini um, at politiski myndugleikin longu í dag, týsdagin, fór at blanda seg upp í trætuna millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Eg veit ikki, hvør tað er, ið hevur so lívligt hugflog, at hann veit hesi tíðindi. Sjálvur havi eg einki hoyrt um hetta, fyrr enn nú, tit ringja, segði løgmaður í telefonini týsmorgunin.

Tað er annars Bjarni Djurholm, ið er landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, og tískil hevur politisku ábyrgdina av trætuni. Men heldur ikki hann ætlar, at verkfallið skal steðgast í tinginum beinan vegin.

Einki uppskot er komið til Løgtingsskrivstovuna ella formansskapin í løgtinginum um at kalla løgtingið saman at steðga verkfallinum.

Tíksil eru tíðindini um politiska uppíblandan í verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag einki annað enn leysatíðindi – í hvussu er fyribils.

Væl eydnaðar sjálvstýrissamráðingar:

Danir lova føroyskt skipaeftirlit

Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, og danski vinnumálaráðharrin, Ole Stavad, samdust í gjár um, at føroyingar skulu hava føroyskt skipaeftirlit 1. januar næsta ár

Sjálvstýrisamtyktin
John Johannessen

Danir vilja gera alt fyri, at føroyingar fáa eitt føroyskt skipaeftirlit 1. januar 2002.

Hetta lovaði danski vinnumálaráðharrin, Ole Stavad, á samráðingarfundi við føroyska landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclassen, í gjár.

Fundurin føroyska landsstýrismannin og danska ráðharran var tann fyrsti samráðingarfundurin eftir nýggju sjálvstýrissamtyktini, sum landsstýrið er farið at arbeiða eftir. Og fundurin gekk av tí allar besta.

– Eg eri væl nøgdur. Fundurin gekk væl, og danir eru sera positivir. Hetta er rætti hátturin at náa málinum um sjálvstýri, segði Jørgen Niclassen við Sosialin á middegi í gjár beint eftir samráðingarfundin.

Ole Stavad og Jørgen Niclassen ásanna báðir, at fleiri trupulleikar eru í at gera skipaeftirlit til føroyskt málsøki. Men hesar trupulleikar eru teir samdir um at loysa so hvørt, sum teir stinga seg upp.

Ein bólkur av embætisfólkum fer nú at leggja lunnar undir føroyska skipaeftirlitið. Og stinga trupulleikar seg upp á vegnum, er danski vinnumálaráðharrin altíð til reiðar at tosa við føroyska landsstýrismannin um at loysa hesar trupulleikar.

– Vit fara at gera alt, vit kunnu, fyri at hava eitt føroyskt skipaeftirlit 1. januar, lovar Jørgen Niclassen.

IRF givið at savna rusk í Norðoyggjum

Blokadan í Lorvík ger, at IRF sleppur ikki av við ruski úr Norðoyggjum. Tí er innsavningin steðgað og bingjuplássið stongt

RUSK
Eyðun Klakstein

Klaksvík: IRF er givið at savna rusk í Norðoyggjum, tí bilarnir hjá teimum sleppa ikki á brennistøðina í Lorvík.

Arbeiðsfólk blokera á ferjuleguni í Lorvík, og eisini IRF-bilarnir verða raktir av hesi blokadu.

Hetta hevur við sær, at bilarnir hjá IRF í Norðoyggjum eru fullir av ruski, og eisini bingjurnar í Norðoyggjum eru fullar. Tí er bingjupláss í grótbrotinum stongt, og tikið verður ikki ímóti meira ruski.

Fólk verða tí sjálvi noydd at goyma húsarhaldsruski komandi dagarnar, tí ruskposarnir verða ikki heintaðir. Eisini virki mugu goyma sítt burtkast til blokadan er av.

Allar ruskbingjurnar í Norðoyggjum eru á tremur, og norðoyingar sleppa ikki av við ruski, tí arbeiðsfólk blokera í Lorvík

Gospelbrakið avlýst

Konsertin við svenska gospelbólkinum, Jerusalem, er avlýst, tí verkfallið órógvar flogferðslu og flutning

AVLÝSING
Eyðun Klakstein

Verkfallið hevur nú fingið avleiðingar fyri størstu gospelkonsertina í Føroyum í langa tíð.

Ældtanin var, at svenski gospelrockbólkurin, Jerusalem, skuldi spæla í ítróttarhøllini í Runavík komandi leygarkvøld, men hendan konsertin er nú avlýst.

Adore Music, sum skuldi skipa fyri konsertini, heldur, at óvissan um flogferðslu og flutning er so stór, at teir ikki tora at gjøgnumføra konsertina.

– Flogferðslan er rakt av verkfallinum, og tí kann Jerusalem ikki fáa síni ljóðføri yil Føroya. Harafturat er rættiliga óvist, um vit kunnu flyta ljóðannleggið úr Havn til Runavíkar, nú blokada er í Kollafirði, sigur Eyðun Jacobsen frá Adore Music.

Óvist um teir koma seinni

Jerusalem er ein av fremstu gospelbólkunum í Europa, og tí var lagt upp til eina stóra konsert.

– Tað er sera spell, at vit mugu avlýsa konsertina, tí vit ætlaðu at hava eina konsert á høgum stigi. Men vit tora ikki at satsa uppá, at tað skal eydnast, soleiðis sum støðan er í løtuni, sigur Eyðun Jacobsen.

Enn er ikki avgjørt, um Jerusalemn kemur til Føroya seinni, men Adore Music vónar, at hetta fer at lata seg gera.

Arbeiðsmaknaðurin til hoyringar

Hol skal setast á kjakið um, hvussu ábyrgd og skyldur skulu býtast millum tað almenna og framtíðar arbeiðsmarknaðin. Tað heldur Tjóðveldisflokkurin, sum tekur evnini upp á almennari hoyring í Norðurlandahúsinum

ARBEIÐSMARKNAÐUR
John Johannessen

Samstarvið millum ymsu feløgini á arbeiðsmarknaðinum er í sorli, verkfall er og viðurskiftini hjá teimum tímalønturn á privata arbeiðsmarknaðinum eru ruðuleikakend.

Hetta er dagsins støða á føroyska arbeiðsmarknaðinum, sum Tjóðveldisflokkurin ynskir at seta undir lupp á almennari hoyring í Norðurlandahúsinum komandi mikukvøld.

Ábyrgd og skyldur

Tjóðveldisflokkurin heldur tað tykjast sum, at politiska skipanin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki hava tikið eina greiða støðu til, hvussu ábyrgd og skyldur skulu býtast á framtíðar føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Men fyri at seta hol á kjakið um hetta, hevur Tjóðveldisflokkurin boðið umboðum fyri arbeiðsmarknaðin, umboðum fyri arbeiðsgevarum og politikarum til almenna hoyring, har støða millum annað skal takast til fimm spurningar, ið viðvíkja hesum evni.

Spurningarnir eru hesir:

– Hvønn leiklut fáa føroysku fakfeløgini í framtíðini?

– Hvørjar uppgávur og skyldur hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum á eftirlønarøkinum, og hvørjar uppgávur hevur politiska skipanin?

– Hvussu skulu vit skipa føroyskar arbeiðsmarknaðarútbúgvingar og eftirútbúgvingar?

– Hvussu kann eitt gott arbeiðsumhvørvi gerast ein náttúrligur partur av øllum vinnuligum virksemi?

– Hvat kunnu vit í Føroyum læra av royndunum av arbeiðsmarknaðarpolitikki num í øðrum londum og í hvørjum førum er best, at vit gera okkara egnu royndir?

Fleiri skyldur

Tjóðveldisflokkurin vísir á, at gongdin í grannalondum okkara seinastu árini hevur verið, at alsamt fleiri skyldur og uppgávur verða fluttar frá almennu myndugleikunum út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Sum dømi verða nevnd eftirlønartryggingar, eftirútbúgvingar av starvsfólki og verkætlanir viðvíkjandi betri arbeiðsumhvørvi.

Hesa gongdina sær Tjóðveldisflokkurin aftur í Føroyum. Hann vísir millum annað á, at ALS er skipað sum partur av arbeiðsmarknaðinum, og at tann jást samtykti barnsburðargrunnurin er ein arbeiðsmarknaðarfyriskipan.

Men samstundis vísir flokkurin á, at tað tó ikki tykist, sum at poltitiska skipanin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava tikið eina greiða støðu til, hvussu ábyrgd og skyldur skulu býtast teirra millum.

Politikarar spyrja

Almenna hoyringin um arbeiðsmarknaðin verður sett í Norðurlandahúsinum klokkan hálvgum átta mikukvøldið. Pallborðið verður mannað við Gunnleivi Dalsgarð, formanni fyri Starvsmannafelagið, Ingeborg Winther, forkvinnu fyri Føroya Arbeiðarafelag, Elsu Birgittu Petersen, forkvinnu fyri Føroya Lærarafelag, Jan Mortensen, stjóra fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag og Tummas Magnussen, deildarstjóra á lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum.

Umframt hesi luttaka Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, og Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins á fundinum. Hesir báðir fáa ein eitt sindur øðvísi leiklut, enn vit vanliga síggja teir í. Teir skulu nevniliga sita og spyrja pallborðið ymsar spurningar, ið viðvíkja hesum evnum. Kortini fáa teir eisini møguleika at koma við egnum viðmerkingum.



Verkamaðurin verður høvuðsevnið á almennari hoyring um arbeiðsmarknaðin, sum Tjóðveldisflokkurin skipar fyri í Norðurlandahúsinum mikukvøldið